# Lagnan hjá Smyril Line í hondunum á løgtinginum

**Í dag leggur Javnaðarflokkurin uppskot fyri tingið um at hækka almenna partapeningin í Smyril Line til tess at stuðla undir nýggju íløguna í tíðarhóskandi skip**

NÝGGJ NORRØNA
*Jan Müller*

Tá lunnar vórðu lagdir undir at menna Smyril Line lat løgtingið í 1984 veðhald og tryggjaði harvið framtíðar ferðafólksambandið millum Føroyar og umheimin. Nú stóríløga skal gerast í nýtt skip eru aftur boð eftir løgtinginum. Stjórin í Smyril Line, Óli Hammer vónar, at tingfólk fara at taka undir við uppskotinum frá Javnaðarflokkinum um at hækka partapeningin og lovar hann, at hetta skal koma at gagna Føroyum, eins og almenna íkastið fyri fimtan árum síðani var við til at tryggja felagnum eina framtíð.

– Landið skal sjálvandi reka sín politikk, men tað er eisini umráðandi, tá vit eru so fá, at landið er við til at lyfta í felag við vinnuna, tá talan er um so stórar íløgur. Eg veit summi eru ímóti, at tað almenna skal fara uppí slíkt, men kann slíkt íkast frá tí almenna gera, at vit her varðveita og menna eina vinnu, so haldi eg, at hetta er skilagott fyri okkum øll sigur Óli Hammer og vísir somuleiðis til tann stóra týdning, sum nýggja Norrøna kann fáa fyri allan framtíðar ferðamannavinnupolitikkin.

– Onkur hevur sagt, at ferðavinnan skal vera eitt av okkara nýggju búskaparbeinum at standa á, og tí er eisini rætt, at vit øll virka saman. Tí er tað mín sannføring, at hetta er ein sera skilagóð íløga fyri føroyska samfelagið. Tað er ikki ov nógv sagt, at logistikkur verður eitt av lyklaorðunum í framtíðar Føroyum, og her kann nýggja Norrøna verða við til at fylla karmarnar út.

## Hækka partapening

Aðalfundur var í Smyril Line fríggjadagin. Tá varð øll ætlanin við nýggju Norrønu umrødd og samtykt varð at hækka partapeningin úr teimum umleið 45 mill. kr. uppí 300 mill. kr. Á fundinum boðaði Knút Nolsøe, sum hevur verið nevndarlimur í 15 ár, at hann tók seg aftur, og í hansara stað valdi Vinnumálastýrið Christian Andreassen, advokat.

Smyril Line skrivaði í 1999 undir fyribilssáttmála við týska skipasmiðju um at byggja eina nýggju ferju, sum skal avloysa verandi



Norrønu og kemur hon at kosta góðar 700 mill. kr. Fyri at styrkja Smyril Line fíggjarliga til hesa uppgávu er ætlanin at fáa nakrar nýggjar íleggjarar at seta pening í felagið. Teir nýggju íleggjararnir skulu skjóta á leið 125 mill. kr. í Pf. Smyril Line. Hækkanin av partapeninginum skal so saman við inntøkuni frá søluni av Norrønu nýtast til at gjalda eginpeningin í nýbygninginum. Pf. Smyril Line skal noterast á nýggja partabrævamarknaðinum, sum ætlandi kemur at virka næsta ár. Hetta skuldi sambært leiðsluni í SmyrilLine gjørt tað lættari hjá íleggjarum og partaeigarum at umseta partabrøvini.

– Tað eru sjálvandi tey, sum halda risaíløguna verða »det glade vanvid«. – Til teirra vil eg bert siga: hyggið at hvat hendi í 84, tá landið veðhelt fyri 26 mill., sum síðani vórðu inndrignar seks ár seinni, soleiðis at landið einki misti. Hetta hevur verið ein náttúrligur útviklingur, sum vit føroyingar hava notið nógv gott av og sum í framtíðini kann gerast ein góð inntøkukelda sigur Óli Hammer.

Stjórin í Smyril Line ger greitt, at henda rutan ber bert eitt felag, og heldur at arbeiðið, sum er gjørt, má ikki detta niðurfyri. Hann vísir til kappingina frá tveimum flogfeløgum, so talan er ikki um nakra monopolstøðu. – Vit hava eina ótømandi kvotu at taka av, og tað er rísastóri marknaðurin í Europa. Vit hava eitt reint umhvørvi og eina náttúru, sum er nakað heilt fyri seg. Tað er ikki summar við sól, men so nógv annað. Tí mugu vit í felag marknaðarføra land okkara og londini í Atlantshavi, og tað krevur so av okkum, at vit arbeiða saman og royna at betra umstøðurnar á landi eisini. Her meti eg Ferðaráðið sum ein sera týðandi brikk til tess at samskipa arbeiðið.

Stjórin á Smyril Line heldur teirra konsept, har teir bæði hava flutning, gisting og útgerðir um hendi sum eitt sera gott konsept og tí eisini avgjørt vert at vága íløgur í.

Leiðslan í Smyril Line sigur í frágreiðing síni um verkætlanina, at íløgan í nýggja Norrønu er ein risaíløga í infrastrukturin millum Føroyar og umheimin, men gongdin í samfelagnum, vøksturin í búskapinum frá alivinnuni og oljuvinnuni, betringin í infrastrukturinum í Føroyum við undirsjóvatunlum, nýggjum ferjum til Sandoyar og Suðuroyar sigur, at nú er rætta løtan at gera hesa íløgu. Felagið metir eisini, at fíggjarliga kemur íløgan at løna seg, at íløgan gevur møguleika fyri stórum avkasti.

## Partaeigarar 1. rætt

Í sambandi við hækkan av partapeninginum er lýsing í blaðnum í dag, har verandi partaeigarar komandi tvær vikurnar hava møguleika fyri at at hækka sín partapening. Lógin sigur nevniliga, at verandi partaeigarar hava 1. rætt til at hækka partapeningin til kurs 100. Annars er avgjørt at hækka virði á partabrøvunum, soleiðis at partabrøv uppá 1000 kr. nú eru 3000 kr. verd. Tað nýggja er so eisini, at eingin einstakur partaeigari kann eiga meira enn 40% av samlaða partapeninginum.

Sum støðan er nú, so hava teir fingið játtaðar 50 mill. kr. í Hetlandi og 10 mill. kr. í Íslandi. Óli Hammer stjóri ivast ikki í, at stórur áhugi verður at tekna partapening millum føroyingar og metir hann talan verður um eina tveysiffrað upphædd, sum fer at verða teknað her. Framtaksgrunnurin hevur so lovað at lata 25-30 mill. kr. men treytin er tann, at ein stórur innskjótari kemur aftrat. Og her er tað, at kalkulerað verður við umleið 25 mill. kr. frá landinum. Sum støðan er nú, so stendur og fellur øll ætlanin við avgerðini á Føroya løgtingi. Aftrat hesum kemur so sølan av Norrønu uppá einar 50 mill. kr. Smyril Line skal í seinasta lagi 2. apríl vátta fyri týsku skipasmiðjuni, at tey 20% í eginpeningi eru í lagi umframt at fíggingin skal verða komin uppá pláss. Her eru samráðingar í løtuni við føroyskan peningastovn. – Eg havi góðar vónir um, at tingið samtykkir uppskotið frá Javnaðarflokkinum, tí tá er eginpeningurin komin uppá pláss. Landspartastjórnin í Slesvig Holstein, har skipið verður bygt, stuðlar eisini projektinum.

Hann vísir eisini á, at stórur áhugi er millum útlendingar at seta pengar í verkætlanina. Harímillum er eitt norðurlendskt reiðarí, sum fegið vil seta nógvan partapening í, men tað er treytað av, at tað fer at eiga 51% av partapeninginum. Tað kemur so ikki uppá tal. Stjórin í Smyril Line er avgjørdur í hesum málinum, tí hann heldur tað vera skeivt, um meirilutin av partapeninginum fer á útlendskar hendur. Tá kunnu vit ongantíð vera trygg um, at skipið fer at verða brúkt til núverandi rutuna og ikki endar onkra heilt aðrastaðni. Hann vil ikki upplýsa, hvat reiðarí talan er um men váttar, at tað snýr seg ikki um DFDS, ið áður hevur røkt siglingina millum Føroyar og umheimin. Smyril Line hevði annars eitt gott samstarv við DFDS í fimm ár. Hann metir tó felagið vera ov stórt til at koma uppí nýggju ætlanina. Tað er so eisini umboð fyri Eimskip, og tí vilja teir heldur ikki fara inn í nakað tiltak á farmaflutningsøkinum, sum er kappingarneyti hjá Eimskip.

Enn er Norrøna so bert á tekniborðinum. Nógv arbeiði verður gjørt og er ætlanin at strekkja kjølin 1. apríl 2002. Skipið verður so sjósett í september og fer royndartúr í 2003. Tað verður latið eigunum 20. mars 2003.

## Farmur stóran týdning

Óli Hammer sigur annars, at ein fortreyt fyri at nýggja skipið kann bera seg er tann, at tað eisini kann sigla við farmi serstakliga vetrarhálvuna, tá tað annars er so óvist við charturi. Eitt nú hevur Nato síni egnu skip nú. Nýggja skipið verður so eisini bygt til at kunna taka nógv fleiri trailarar. Eisini verður tað bygt til at kunna taka tunga og stóra last, eitt nú konstruktiónir, sum kunnu viga heilt upp í 300 tons. Hóast Smyril Line ikki slapp at bjóða uppá útgerðarvirksemið í hesum umfarinum, har teir samstarvaðu við kenda norska felagið »Norsea«, so metir stjórin í felagnum tað fer at verða meira spennandi tá og um olja verður funnin. Tá vil Norrøna vera heilt náttúrlig til flutning av tungum og stórum eindum. So hetta er eisini ein íløga í framtíðina. Her hugsar hann m.a. um tá og um ein veruliga oljuframleiðsla tekur seg upp um nøkur ár. – Tá eru vit so tilreiðar at taka okkum av flutningi í sambandi við eini møguligari útbygging av feltum á føroyskum øki sigur Óli Hammer.

Tá vit aftur spyrja stjóran í Smyril Line, hví teir eru farnir at leggja seg út til farmaflutning eisini, nú tað eru onnur skipafeløg, sum taka sær av hesum partinum, so vísir hann til, at hetta er ein lívstýðandi fortreyt fyri at fáa roknistykkið at hanga saman. Hvussu verður í oljuvinnuni er kanska enn nakað óvist, men á aliøkinum eru stórir møguleikar, nú tosað verður um at útflyta 100.000 tons um árið. Vinnan er fegin um flutningsmøguleikan hjá Smyril Line, nú vøran kann flytast órørd frá hurð til hurð. Henda møguleikan hava aðrir ikki og skulu vit aftur til gamla Líðartind fyri at finna sama konseptið.

# Eitt genialt skip frá kjøli til brúgv

NÝGGJ NORRØNA
*Jan Müller*

Nú skipið kemur at kostar meira enn 700 mill. kr., sum svarar til nærum ein triðing av okkara fíggjarlóg, hava vit spurt stjóran, um tað ikki ber til at spara og gera skipið bíligari. – Sjálvandi kann okkurt gerast, men tað fer at muna so lítið. Tað, sum umræður, er at fáa eitt skip, sum kann nøkta tørvin komandi 20 árini ella so. Og her má roknast við, at ferðafólkini fara at seta krøv til komfort. Vit hava roynt at fáa eitt samlað konsept, ið skal kunna gera tað sera áhugavert fyri ferðafólk at ferðast sjóvegis í Norðuratlantshavi. Kømurini eru sera rúmlig og eru sera væl útgjørd. Óli Hammer sigur, at teir hava brúkt nógva orku uppá at fáa eitt sjógott skip, og har lítil og eingin larmur er. Hann er gott greiður yvir, at teir kunnu fáa kapping frá flogferðsluni, men tað vilja altíð vera mong, sum ynskja at ferðast sjóvegis og her telur tað nógv, at tey kunnu taka sín egna bil við. Tí verður bildekskapasiteturin eisini so nógvar ferðir størri enn umborð á núverandi Norrønu.

– Eg havi tosað við fleiri útlendingar um nýggju ætlan okkara, og teir siga bart út, at hetta er eitt genialt skip frá kjøli til brúgv. Tað er so eisini bygt upp við teimum drúgvu royndum vit hava í hesi siglingini, sigur Óli Hammer, sum sjálvur hevur verið við frá byrjan, tá Smyril varð keyptur til endamálið. Nú verður ringurin so sluttaður og vónar hann at kunna vera við til at fremja hesa útbyggingina eisini.

Hvat viðvíkur ferðaætlanini, so verða har ongar serligar broytingar. Men hevði ikki verið skilabetri at siglt til Aberdeen heldur enn til Hetlands spurdu vit Óla Hammer! – Tað kann man sjálvandi siga. Men tá skuldi skipið kunnað siglt eini 30 míl, og tað ger tað ikki. Tað siglir 21 míl. So hetta letur seg ikki gera í tí rutumynsturi, sum vit hava bygt upp. Hann heldur tað eisini vera framtíð í at kunna sigla til Hetlands, tí haðani er gott samband við Orknoyggjar og Skotland. Skotska felagið North-link, sum hevur fingið siglingina millum oyggjarnar og Skotland – hon var áðrenn rikin av P&O – hevur tveir nýgbygningar í gerð í Finlandi, sum skulu minka um siglingstíðina úr Hetlandi til Skotlands við 6 tímum, niður í 10 tímar. Óli Hammer fegnast tí um, at hetlendingar hava viljað sett pengar í Norrønu og dylur hann ikki fyri, at nógv skilagott kann spyrjast burtur úr hesi rutu í framtíðini. Eitt nú satsa hetlendingar uppá at útflyta eini 50.000 tons av alifiski um árið. Hinvegin kann Norrøna koma at vera tað skumpið, sum skal til fyri at byggja brýr aftur millum oyggjafólkini í Norðuratlantshavi. Hetlendingar vilja eisini menna samstarvið við norrønu grannar sínar. – Men vit hava eisini nógv at læra av hetlendingum. Teir duga í summum førum betri enn vit at standa saman, meðan vit her heima oftani draga hvør sína línu.



# Avreiðingar hvønn dag

UPPBOÐSSØLA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Vit byrja í blaðnum í dag at prenta avreiðingarnar sum enda á gólvuppboðssøluni hjá Fiskamarknaði Føroya. Hetta er ein táttur, sum nógvir lesarar hava saknað og sum vit nú eftir drúgvar áheitanir taka uppaftur. Í áttatiárunum var tað heilt vanligt, at bløðini prentaðu avreiðingar, men síðan hevur hesin táttur ikki verið regluligur. Hvussu umfatandi avreiðingarnar fara at vera, tað velst um so nógv. Veður og vind og serliga streym og eisini hvussu fiskitíðin er.

Vit fara at prenta avreiðingarnar sum verða gjørdar á til gólvuppboðssølurnar í Klaksvík, á Toftur, í Suðuroy og í Vágum. Ætlanin er, at fiskitíðindini í Sosialinum skulu standa á somu síðu sum avreiðingarnar. Vónandi fer lesarin at taka væl í móti hesum tátti og øll eru hjartaliga vælkomin at koma við uppskotum til greinar um fiskivinnu.



*Savnsmynd*

# Toskur fór fyri kr. 21,55

UPPBOÐSSØLA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

60 tons vóru seld fyri ein góða millión á telefonuppboðssøluni hjá Fiskamarknaði Føroya mánamorgunin. Prísurin á toski var kr. 21.55 fyri kiolið. Hýsan fór fyri kr 13.41 og upsin var heilt niðri á trimum krónum fyri kiloið.

Kongafiskurin fór fyri kr. 10.26 og tungan fyri kr. 20.00 kiloið.

Sjey bátar seldu á telefonuppboðssøluni mánamorgunin. Teir vóru Nesborg, Norðleivur, Nýborg, Randi, Tindur, Vesturbúgvin og Vesturfarið.

Miðalprísurin á telefonuppboðssøluni mánamorgunin var kr. 18.10.

# 2182 og kanal 16 á føroyskar hendur

FISKITÍÐINDI
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Landsstýrið er nú farið undir at fyrireika einasta økið innan fjarskifti, sum enn er á donskum hondum.

Seinasta týsdag legði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður fram uppskot um yvirtøku av radiogrundaðu neyð og trygdartænastuni á havinum, styttri kann tað ikki sigast. Tilmælið varð tikið til eftirtektar.

– Neyð og trygdartænastan, har strandalond veita 24 tíma lurtitænastu á ávísum tíddum, tað er frekvensum, liggur framvegis undir ríkinum. Tað er ein partur av sokallaðu veitingarskylduni hjá Tele Danmark, og skulu teir veita hana til og við 2007, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

Føroya Tele røkir hesa uppgávuna vegna Tele Danmark og fær endurrindað útreiðslurnar fyri tænastuna, sum eru góðar 6 mió. kr, árliga. Neyð og trygdartænasta húsast á Telegrafstøðini, og hon er ein partur av strandarradiotænastuni. Á Telegrafstøðini starvast fólk, sum hava neyðugan førleika, sum tænastan krevur sambært altóða ásetingum til at røkja uppgávurnar.

– Farið verður undir fyrireikandi yvirttøkuarbeiði í samráð við danskar myndugleikar. Roknað verður við, at frá tí at samráðingarnar eru byrjaðar og til tænastan verður yvirtikin fer at ganga tvey og eitt hálvt ár, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

## Hótta við Brimli

Fakfeløgini boðaðu fríggjadagin frá, at hendir ikki nakað viðvíkjandi trætuni um Brimil í seinasta lagi á midnátt mánadagin, so fóru feløgini at seta tiltøk í verk. Tey vildi ikki útgreina, hvørji tiltøk talan var um.

Partarnir hava samráðst í vikuskiftinum, men er einki komið0 fram, umn partarnir eru nærkaðist hvørjum øðrum.

Ongin ivi er tó um, at fer Karsten Hansen, landsstýrismaður við einum uppskotið niðan í tingið sum trumfar eina avgerð í gjøgnum, so fara fakfeløgini at svara harðliga aftur.

# Gólvuppboðssølan

Knappliga 5.000 kilo vórðu landað á gólvuppboðssøluni leygardagin.

| Sýslunummar | Skipanavn | kilo |
|---|---|---|
| FD 25 | MASCOT | 510 |
| FD 306 | VESTURLAND M/S | 133 |
| FD 492 | KLETTUR | 307 |
| FD 670 | STJØRNAN | 379 |
| FD 810 | MORGUNSTJØRNAN | 201 |
| KG 507 | SØKIN | 1.530 |
| KG 9 | KLAKKUR | 302 |
| SA 110 | NETJAN | 211 |
| TG 300 | LÍÐARBRØÐUR | |
| | V/H. JOENSEN | 665 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | 534 |
| TG 670 | VÍKABERG | 160 |
| VN 517 | VESTURLEITIÐ | 31 |

# Toskur er heimkærur

FISKITÍÐINDI
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Magnus Heinason hevur á royndarveiði í fjør gjørt eina áhugaverda eygleiðing. Teir hava roynt at flyta tosk millum tær ymisku leiðirnar. Hetta er gingið fyri seg á tann hátt, at Magnus Heinason hevur trolað eftir toski á einari leið, teir hava síðan merkt toskin og slept honum út aftur á eini aðrari leið. Trolingarnar hjá Magnus Heinasyni í fjør vísa, at fleiri toskar, sum vóru veiddir eitt nú eystanfyri og síðan sleptir út vestanfyri, teir vóru aftur fingnir í trolinum hjá á sama staði, sum teir upprunaliga vóru veiddir.

# Ráðstevna um skipaeftirlit

Almenn ráðstevna um yvirtøku af Skipaeftirlitinum verður í útvarpshøllini mikudagin tann 21. februar.

Tað er felagið Skipating, sum skipar fyri ráðstevnuni við tí endamáli at lýsa nærri hvussu skipaeftirlitið kann skipast og fáast at virka á føroyskum hondum.

Í hesum sambandi hevur felagið fingið Gudmund Gudmundsen frá íslendska skipaeftirlitinum at koma til Føroyar at greiða frá, hvussu íslendingar hava skipað teirra skipaeftirlit. Eisini kemur hann at greiða frá ymiskum royndum teir hava nomið seinastu árini.

Luttøka verður eisini av umboðum frá ymiskum pørtum av sjó og frálandavinnuni í Føroyum.

Ráðstevnan verður skipað sum pallborðsfundur við lúttøku av :

Halgir Winther Poulsen, formaður í yvirtøkunevndini.

Thormund Johannesen, Skipasmiðjur og ráðgevarar.

Jákup Egholm Hansen, Reiðarafelagið.

Óli Jacobsen, Fiskimannafelagið.

Ole Lauritsen, Klassafeløg.

Gudmundur Gudmundsen, Íslendska Skipaeftirlitið.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum fer at seta ráðstevnuna.